

# Leiðari til Dagstovnin á Argjum

**Søkt verður eftir leiðara til Dagstovnin á Argjum at seta 1. oktober 2010 ella skjótast til ber.**

Dagstovnurin er sjálvsognarstovnur við fimmmannanevnd, men verður kommunalur stovnur frá 1. januar 2011. Bæði nú og í umleggingini tørvar okkum fólk við áræði til spennandi og mennandi starv.

Dagstovnurin á Argjum vil vera eitt trygt stað, har børn fáa góðar fyrimyndir og mennast saman við starvsfólkunum og læra ábyrgd í felagsskapi. Stovnurin er skipaður við umleið 80 børnum í vøggustovu, barnagarði og forskúlabólki.

**Vit leggja dent á**

- at sýna opinleika fyri foreldrum og starvsfólki
- at bjóða starvsfólki fakliga menning
- at geva øllum ábyrgd
- at sýna virðing og skapa trivnað
- at menna og bjóða av
- at byggja á spælið, bæði inni og úti
- at bjóða bæði vøggustovu, barnagarð og forskúlabólk

**Vit bjóða tær**

- starv við ávirkan og avbjóðing
- starv, ið krevur álit og sjálvstøðugt arbeiði
- starv, har tú nýtir dygdir og mennist

**Tú bjóðar okkum**

- námsfrøðiliga útbúgving
- leiðsluroyndir og møguliga leiðsluútbúgving ella eftirútbúgving
- dirvi og visiónir
- fakliga vitan
- samskiftisevni
- framfýsni og hug at halda fram við søgu og menning stovnsins
- virðing fyri ymiskleika
- hollan kunnleika til teldu
- kunnleika til roknskap

**Setanartreytir**

Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, deildarleiðara á Barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu, tel. 302010 / 214032, ella Sølvu Heinesen, næstformann í nevndini, tel. 506725.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 2. august 2010** og skulu stílast til:

Dagstovnurin á Argjum
c/o Tórshavnar kommuna
Vaglið 1
100 Tórshavn
Att.: Katrin Petersen

SENDISTOVAN




NÝGGJUR HANDIL
Í MIÐLON

Nýggjur handil er latin upp í Miðlon við vøkrum klæðum úr Thailandi og ymiskum tingum.

TELEFON 27 88 06

Eysturkommuna

Summarfrí

Vegna summarfrí er kommunuskrivstovan stongd frá 19 juli.

Opið verður aftur 9. august. Víst verður annars til heimasíðuna www. eysturkommuna.fo



Sosialurin 341800

Raðhús í Hoyvík

til sølu

Ljós og hugnalig raðhús
við sera góðum útsýni til sølu.
Hvør hæddin er umleið 60 fermetrar.
Húsini standa í barnavinarligum umhvørvi,
tætt við skúla, dagstovnar,
bussamband o.a.

**Les meira á www.ks57.info
ella ring 21 80 46**

Sosialurin -har tað hendir

Les Sosialin so ert tú við